## Innlendismálaráðið umsita Felagsskránna

**Í morgin, 1. september, yvirtekur innlendismálaráðið umsitingina av Felagsskránni**

FELØG
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Felagsskráin er ein skrá, har føroysk feløg, felagsskapir, samtøk, samskipanir o.l. við lógligum endamáli kunnu biðja um at verða skrásett.

Við skrásetingini fær felagið m.a einkarrætt at brúka navn, frámerki og onnur sermerki, sum eyðkenna felagið.

Innlendismálaráðið sigur, at Felagsskráin varð longu yvirtikin sum føroyskt sermál í 1948, men at fútin hevur higartil umsitið skránna.

Annika Olsen, landsstýriskvinna, hevur nú avgjørt, at skráin tann 1. september 2009 skal flytast til Innlendismálaráðið.

Í dag eru skrásett 127 feløg í Felagsskránni.



# Laksaprísurin fellur munandi

**Seinastu vikurnar er laksaprísurin fallin munandi. Ein orsøk er, at norðmenn hava munandi meira fisk í sjónum, enn hildið varð, og hesin fiskurin verður tikin nú.**

ÚTFLUTNINGUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Laksaprísurin hevur verið góður nú eina tíð, men nú fellur prísurin. Tað skrivar Vinnuhúsið á heimasíðuni.

Orsøkirnar eru fleiri. Ein orsøk er, at norðmenn hava munandi meira fisk í sjónum, enn roknað varð við, og tøkan seinastu vikurnar hevur tí verið munandi størri, enn tøkan somu vikur fyri einum ári síðani. Summar vikur er munurin umleið 30%.

Somuleiðis hevur norska stjórnin økt um nøgdina á alifiski, sum alarar kunnu hava á einum alieki, við fimm prosentum, umframt at latið nógv nýggj aliloyvir kring alt landið. Norðmenn vísa marknaðinum, at har er nógvur fiskur at fáa, og hevur hetta óivað eina ávirkan á atburðin á marknaðinum.

Um hugt verður eftir fóðursøluni í Noregi sæst, at fóðursølan er økt 13% higar til í ár í mun til sama tíðarskeið í 2008, harav økingin í nýtsluni av laksafóðri er økt 18%. Hetta gevur ábendingar um munandi meira fisk í sjónum, og meira enn tann vøkstur, sum norðmenn fyrr hava boðað frá, á 7-8 prosent um árið.

Samanumtikið verður roknað við, at norðmenn næstu tíðina fara at økja so nógv um framleiðsluna av laksi, at laksaprísurin fer at falla enn meira.

## Lutfalsliga lágt arbeiðsloysi í Føroyum

VINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Samlaða arbeiðsloysi í teimum 27 ES-londunum er síðani á sumri í 2008 farið úr 7% upp í 9% av samlaðu arbeiðsmegini. Ringast stendur til í Spania, har arbeiðsloysi er komi heilt uppá 18,1%. Í baltisku londunum er støðan ikki stórvegis frægari, tí har er arbeiðsloysi um 17%, skrivar Samtak.

Holland hevur við sínum 3,2% arbeiðsleysu greitt lægsta arbeiðsloysi innan ES. Í Evropa annars er tað Noreg, ið hevur lægst arbeiðsloysi við 3,1% síðani er Holland við 3,3% og á triðja plássi eru Føroyar við 3,7%.

Í USA og Japan er arbeiðsloysi ávíðkavist 9,5 og 5,2%.

### Norðurlendska Arbeiðsloysi

**Um hugt verður at Norðanlondunum er arbeiðsloysisstøðan henda:**

| | juli 2009 | juli 2008 |
|---|---|---|
| Noreg | 3,1% | 2,4% |
| Føroyar | 3,7% | 1,2% |
| Grønland* | 4,0% | - |
| Danmark | 6,2% | 3,3% |
| Ísland | 8,0% | 1,1% |
| Finland | 8,5% | 6,4% |
| Svøríki | 8,9% | 6,0% |





40 ára starvsdagur

Í sambandi við at Jens Lundblad hevur starvast hjá okkum í 40 ár, bjóða vit til móttøku hjá Berg Motors, Staravegur 1-3, týsdagin 1. september frá kl. 15-17.

BERG MOTORS
www.bergmotors.fo






Sølubúð | Bilvask | Bensinsøla | Videoútleigan

Leiðari til
Statoilstøðina á Tvøroyri m/k

Statoilstøðin á Tvøroyri skal hava nýggjan leiðara. Tú fært ábyrgdina av dagligu leiðsluni av støðini. Vit hugsa okkum at tú er framtakshugaður, ágrýtin og nýhugsin. Vit kunnu bjóða tær eitt áhugavert starv í einum mennandi handilsumhvørvi. Royndir geva fyrimun.

Løn eftir nærri avtalu.

Meira fæst at vita við at venda sær til Statoilstøðina á Tvøroyri v/ P/F N.J. Mortensen á telf. 371002 og tosa við Gudmund Mortensen.

Skrivligar umsóknir verða viðgjødar í trúnaði og skulu vera okkum í hendi innan 8 sept. 2009

**Tær skulu sendast til:**
Statoilstøðina á Tvøroyri
v/ P/F N.J. Mortensen
Tvørávegur 2 FO-800 Tvøroyri

Statoilstøðin á Tvøroyri, ið liggur í einum livandi handilsumhvørvi í miðbýnum, selir brennievni og alt til bilin, umframt kioskvørur, vidofilmar, bakaravørur og pylsur v.m. Á Statoilstøðini á Tvøroyri starvast 10 fólk.

STATOIL